Løgmálaráðið

Dagfesting:	04.11.2025
Mál nr.:	25/22798
Málsviðgjørt:	NF
Ummælistíð:	12.09-12.10.2025
Eftirkannað:	14.10.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um revsing (Revsilógin)
(Sektir fara sum høvuðsregla í landskassan)

§ 1

Í løgtingslóg um revsing (Revsilógin), sambært løgtingslógarkunngerð nr. 8 frá 20. februar 2024, sum broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 2. mai 2025, verður § 50, stk. 1 orðað soleiðis:

"Sektir fara í landskassan, tó fara sektir fyri brot á lóggávu á ikki yvirtiknum málsøkjum og ferðslulóggávuna í ríkiskassan."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Danska stjórnin og landsstýrið hava við avtalu, dagfest 17. juni 2025, avgjørt at broyta býtið av sektarúrtøkuni millum ríkiskassan og landskassan. Broytingin kemur í gildi 1. januar 2026.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært § 50, stk. 1 í revsilógini er ásett, at sektir fara í ríkiskassan. Sektir og innheintan av sektum koma undir brotsmálaumsorgan, sum ikki er undir føroyskum málsræði. Reglur um innheintan av sektum eru í kap. 16 í Revsifulnaðarlógini (Straffuldbyrdelsesloven for Færøerne), §§ 90-93, har politiið m.a. kann biðja TAKS hjálpa til við innheintingini.

Útgangspunktið sambært revsilógini er, at sektir fara í ríkiskassan. Undantakið er t.d. avtalan frá 1981/1982 millum Forsætismálaráðið og landsstýrið um at deila ágóðan av sektum og inndrátti (konfiskatión) innan fiskivinnuøkið, og møguliga aðrar ásetingar í serlóggávuni, sum áseta eitt annað býtið. Avtikna reglan í § 15 í gomlu politilógini staðfestir fyri so vítt høvðsregluna um, at sektir fara í ríkiskassan, men undantekur tó sektir, sum verða álagdar og innheintaðar av føroyskum myndugleikum uttan hjálp frá politi og dómstólum.

Fleiri og fleiri málsøki eru yvirtikin sum føroysk sermál seinastu árini. Av hesi orsøk varð hildið, at tíðin var farin frá hesum býtinum, og at sektir, sum verða álagdar eftir lóggávu undir føroyskum málsræði, áttu at fara í landskassan. Í teimum førum er tað vanliga føroyskir myndugleikar, sum hava útreiðslur av slíkum málum t.d. Kappingareftirlit, Kappingarráð, Heilsufrøðiliga starvsstovan og Føroya Kærustovnur.

Landsstýrið tók upp tingingar við ríkismyndugleikarnar um at gera eitt øðrvísi og meira rímiligt býti av sektunum. Tingingarnar endaðu við eini nýggjari avtalu, dagfest 17. juni 2025.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Við hesum lógaruppskotinum verður revsilógin broytt samsvarandi nýggju avtaluni frá 17. juni 2025 um, at sektir fara í landskassan; tó fara sektir fyri brot á lóggávu á ikki yvirtiknum málsøkjum og ferðslulóggávuna í ríkiskassan

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Danska stjórnin og landsstýrið hava avgjørt at broyta býtið av sektarúrtøkuni millum ríkiskassan og landskassan. Avtalan merkir, at inntøkurnar frá sektum og inndráttum, sum verða álagdar ella dømdar eftir lóggávu í yvirtiknum málum, frá 1. januar 2026 fara í landskassan, meðan inntøkurnar frá sektum og inndráttum, sum verða álagdar ella dømdar eftir lóggávu í felagsmálum, fara í ríkiskassan. Undantiknar hesi avtalu eru inntøkur, sum stava frá handhevjingini hjá løgregluni í Føroyum av føroysku ferðslulógini. Hesar fara framhaldandi í ríkiskassan.

Avtalan millum Forsætismálaráðið og landsstýrið, undirskrivað ávikavist hin 17. august 1981 og 10. mai 1982, um býti av úrtøkuni av ávísum sektum og inndráttarinntøkum, sum stava frá broti á galdandi lóg og ásetingar um fiskiskap á fiskiøkinum við Føroyar, fer úr gildi.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Hesi fingu uppskotið sent beinleiðis til ummælis:

Brotsfrøðifelag Føroya
Fróðskaparsetur Føroya
Føroya Advokatfelag
Føroya Rættur
Føroya Politi
Kriminalforsorgin
MEGD

Hesi fingu uppskotið í *undanhoyring*:
Løgmansskrivstovan
Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Fíggjarmálaráðið
Fiski- og samferðslumálaráðið

Uppskotið varð eisini lagt á almenna ummælisportalin hjá landsstýrinum og á heimasíðuna hjá Løgmálaráðnum til almenna hoyring. Ummælistíðin var frá 12. september til 12. oktober 2025.

Hesi sendu inn ummæli:
Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Fíggjarmálaráðið og Føroya Politi høvdu ongar viðmerkingar.

Brotsfrøðifelag Føroya tókti skilagott, at sektir á føroyskum málsøkjum falla í landskassan og ikki í ríkiskassan. Tá ið tað snýr seg um milliónir, er enn týdningarmeiri, at hetta kemur í rættlag. Felagnum lystir tó at vita, hvørt hesar sektarupphæddir verða markaðar. Gott hevði verið, um upphæddirnar fóru til brotsfrøðiliga gransking, fyribyrging, endurmenning ("rehabilitering") og útbúgving. Tey vóna samstundis, at politi, brotsumsorgan og aðrir stovnar kunnu arbeiða betur eftir føroyskum viðurskiftum, mentan, siðum og samfelagi, hvørt hetta krevur, at hesir eisini koma á føroyskar hendur ella ikki.

Felagið roknar við, at tað man vera av misgáum, at orðið "fella" verður nýtt heldur enn "falla". Felagið fegnast um, at orðið "ríki" verður nýtt heldur enn "statur". Felagið skjýtur tí upp broyting í § 1, so at § 50, stk. 1 ljóðar: "Sektir falla til landskassans. Tó fara sektir fyri brot á lóggávu á óyvirtiknum málsøkjum og ferðslulóggávuna í ríkiskassan."

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at hesar sektir ikki eru markaðar til ávís endamál, men fara í landskassan. Málsliga viðmerkingin um "at fella" og "at falla" er ikki tikin til eftirtektar, men "fella" er broytt til "fara í".

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Frameftir fara sektir á yvirtiknum økjum í landskassan. Seinastu árini hava vit sæð, at føroyskir eftirlitsmyndugleikar hava tikið mál upp, sum tey meta eru brot á lóggávuna, og eftir kanning hava lagt málið til Føroya Landfúta við uppskoti til sekt.

Talan er t.d. um økir undir Kappingareftirlitinum, Dátueftirlitinum, Heilsufrøðiligu starvsstovuni og Vørn.

Dátueftirlitið hevur lagt mál til Føroya Landfúta við sektaruppskot á kr. 100.000 og eitt annað mál við sektaruppskotið á 15 mió. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eisini lagt mál til løgregluna við sektaruppskoti innan aliøkið við sektaruppskotið á 67 mió. kr. Hesi mál eru ikki avgreidd.

Sektaruppskot frá Kappingareftirlitinum á 18 mió. kr. og 27 mió. kr ella tilsamans 45 mió. endaðu við eini semju, sum m.a. hevði við sær, at fyritøkan játtaði seg sekan í lógarbrotunum og innanrættarliga tók við eini sekt uppá 3 mio. kr. Nýggjur stjóri varð settur í fyritøkuni og Kappingareftirlitið var áhugað í at fáa málið avgreitt við semju – hetta kann hava ávirkað útfallið í málinum.

Talið á sektaruppskotum, sum Vørn hevur latið seinastu 5 árini, liggur í miðal á 20 -22 um árið. Í 2021 gav Vørn t.d. fyrisitingarlig sektaruppskot fyri ólógligan fiskiskap, sum vóru áleið kr. 150.000. Tey seinastu 2 – 3 árini hevur Vørn ikki sent nógv sektaruppskot til Føroya Landfúta til rættarsókn. Hetta er m.a. tí at tann ákærdi hevur tikið við sektaruppskotinum og goldið sektina rættstundis. Men orsøkin er eisini, at royndirnar hjá Vørn við at senda málini til Føroya Landfúta eru, at málini ofta koma í langdrag, og annaðhvørt heilt fella fyri fyrningarfreistini, ella gerðast so gomul, at hóast Føroya Rættur dømir tann ákærda sekan, fellur revsingin ofta heilt ella lutvíst burtur. Hetta er samstundis eisini ein av orsøkunum til, at Vørn er farið at nýta heimildina, at taka aftur rættin at reka vinnuligan fiskiskap, oftari.

Hóast eftirlitsstovnarnir mæla til sektaruppskot á tvísiffraðar milliónaupphæddir, so er tað Føroya Rættur sum skal taka endaliga avgerð um møguliga sekt. Enn eru ov fá mál avgjørd í rættinum, og tí ber illa til at meta um, hvussu stóra upphædd landskassin kann fáa í inntøku av sektum.

Danska løgmálaráðið hevur upplýst, at í teirra tølum síggjast einamest ferðslubøtur, og hesar eru um 4-6 mió. kr. Upphæddir frá øðrum sektum ella innan onnur øki síggjast ikki aftur í tølunum hjá danska løgmálaráðnum og fíggjarmálaráðnum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingarnar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki viðkomandi millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóða sáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið. Hvørki Hoyvíkssáttmálin, Evropeiski mannarættindasáttmálin ella Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum. Uppskotið verður ikki mett at kunna elva til nýggjar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólk, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna

Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Danska stjórnin og landsstýrið hava avgjørt at broyta býtið av sektarúrtøkuni millum ríkiskassan og landskassan. Avtalan merkir, at inntøkurnar frá sektum og inndráttum, sum verða álagdar ella dømdar eftir lóggávu í yvirtiknum málum, frá 1. januar 2026 fara í landskassan, meðan inntøkurnar frá sektum og inndráttum, sum verða álagdar ella dømdar eftir lóggávu í felagsmálum, fara í ríkiskassan.

Undantiknar hesi avtalu eru inntøkur, sum stava frá handhevjingini hjá løgregluni í Føroyum av føroysku ferðslulógini. Hesar fara framhaldandi í ríkiskassan. Hetta er grundað á, at tað er Føroya Politi, sum umsitur ferðslulógina, hóast talan er um yvirtikið málsøki.

Avtalan millum Forsætismálaráðið og landsstýri, undirskrivað ávikavist hin 17. august 1981 og 10. mai 1982, um býti av úrtøkuni av ávísum sektum og inndráttarinntøkum, sum stava frá broti á galdandi lóg og ásetingar um fiskiskap á fiskiøkinum við Føroyar, fer úr gildi.

Til § 2
Gildiskoman er 1. januar 2026. Hetta er sami dagur, sum avtalan 17. juni 2025 kemur í gildi.

Løgmálaráðið, 4. novembur 2025

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein

Yvirlit yvir fylgiskjøl:

Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Avtala millum stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri um broyting av býtinum av sektarúrtøkuni millum landskassan og ríkiskassan, dagfest 17. juni 2025
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Føroya Politi
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Brotsfrøðifelag Føroya